www.sev.fo

# Verður tú okkara **starvsfólkaleiðari?**

**SEV stevnir móti nýggjum avbjóðingum, har m.a. elveitingarlógin, sum kom í gildi í summar, leggur nýggjar karmar fyri virksemið hjá SEV.**

**Harafturat verður arbeitt við broytingum í viðtøkum og bygnaði felagsins, sum m.a. hava til endamáls at gera yvirskipaða bygnaðin meira smidligan.**

Hjá Elfelagnum SEV starvast umleið hálvtannaðhundrað fólk. Broytingarnar í lóggávu eins og bygnaðarbroytingarnar og broytingar í krøvum annars til felagið fara í framtíðini at seta broytt krøv til starvsfólkini. Fyri at hesi skulu fáa so góðar umstøður, sum gjørligt at menna seg til broytingarnar, herundir m.a. skipaða eftirútbúgving v. m. er avgjørt at sóknast eftir rætta persóninum at vera við til at menna starvsfólkini og starvsfólkaøkið, og harvið alt felagið.

Virksemið verður helst í framtíðini meira sundurskilt, har framleiðsluverkini og elnetið fara at arbeiða meira leyst av hvørt øðrum.

Við framleiðsluverkini arbeiða eini 50 – 60 fólk, meginparturin væl útbúnir maskinmeistarar.

Við elnetspartin arbeiða eisini eitt tilsvarandi tal av fólki, harav handverkarar og verkfrøðingar, sum hava vunnið sær servitan innan hettar arbeiðsøkið.

Harumframt er felagsvirksemi, so sum bókhald, kundatænasta og fyrisiting annars.

**Tínar uppgávur verða at:**

- standa á odda fyri starvsfólkadeildini
- hava ábyrgdina av starvsfólkapolitikkinum
- gera eina starvsfólkastrategi fyri alla fyritøkuna í samstarvi við leiðsluna
- standa fyri og leggja til rættis útbúgvingar fyri starvsfólkið
- verða stuðul og ráðgevi hjá deildarstjórunum
- vera við til at seta fólk í starv
- luttaka á leiðslufundum, har starvsfólkamál verða umrødd
- luttaka í lønarsamráðingum
- fara ígjøgnum og meta um verandi sáttmálar
- undirvísa innanhýsis

**Tínir førleikar:**
Vit rokna við, at tú hevur eina hóskandi útbúgving frá hægri lærustovni. Tú er ein persónur, sum tekur ábyrgd, dámar avbjóðingar og er fyrikomandi.

**Vit vænta harumframt, at tú:**

- er ein góður leiðari, sum kann vera við til at ganga á odda at motivera og menna starvsfólk felagsins
- brennur fyri starvsfólkapolitikki – bæði fakliga og menniskjaliga
- dugir at lurta og stuðla
- hevur evni at síggja felagið og tilfeingið úr erva
- hevur menniskjaligar eginleikar
- hevur hollar arbeiðsroyndir

**Løn og setanartreytir:**
Fyri fólk við samfelagsvísindarligari útbúgving verður lønin sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið, annars eftir nærri avtalu.

Starvið hevur tilvísing til deildarstjóran fyri fyrisitingina.

Er hetta nakað fyri teg, ella tú hevur spurningar um starvið, kanst tú seta teg í samband við John P. Danielsen, deildarstjóra ella Klæmint Weihe, stjóra á telefon 346800 ella við at senda teldupost til jpd@sev.fo ella kw@sev.fo.

**Umsóknarfreistin** er 10. september 2007.

Umsóknir skulu sendast til:
**Elfelagið SEV**
Landavegur 92
Postsmoga 319
FO-110 Tórshavn

Viðmerk: Umsókn, starvsfólkaleiðari

SEV

Sosialurin
Sosialurin i




KLOKKAN
ur- og gullsmiður
tel. 35 35 31 · fax 35 35 32 · klokkan@klokkan.fo · www.klokkan.fo



## Søkt verður eftir einum fólki til Smyril Blue Water

SBW søkir eftir einum skrivstovufólki. Starvið verður at seta skjótast gjørligt.

**Starvið fevnir um:**
Avgreiðslu av inngangandi farmi
Kundaavgreiðslu
Vanligt skrivstovuarbeiði
Toll avgreiðslu

**Førleikakrøv:**
Til starvið krevst, at umsøkjarin hevur royndir innan skrivstovuarbeiði. Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur skrivstovuútbúgving.

Neyðugt er, at viðkomandi er vanur at arbeiða við teldu.

Dentur verður lagdur á, at viðkomandi kann arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanaðarviðurskifti:**
Starvið er fulltíðarstarv og verður lønt sambært avtalu.

Umsóknir við møguligum prógvum skulu sendast til

Smyril Blue Water P/F
Att. Heðin Joensen
Postsmoga 3296
FO-110 Tórshavn
hedinj@sbwcargo.com

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 12. august 2007.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Heðin Joensen á tlf. 309620

SMYRIL BLUE WATER

*...Tín skjótasta farmaleið!*

DEKKMASTER.FO

...tá ið prísurin eisini er avgerandi!

**Allar tær kulu**




www.dekkmaster.fo
info@dekkmaster.fo
telefon 227 000